Vitjanartíðin óivað ein tíma fyrrapart og ein seinnapartin

Bæði sjúklingar og starvsfólkið ónøgd við royndarvitjaninar

Vitjanartíðin á Landssjúkrahúsinum verður óivað broytt aftur. Orsøkin er tann, at bæði sjúklingar og starvsfólk á sjúkrahúsinum eru ónøgd við ta nýggju royndarvitjanartíðina

Tað eru nú tríggir mánaðir síðani, at Landssjúkrahúsið fór at royna eina nýggja og broytta vitjanartíð. Henda vitjanartíðin hevur verið hvønn dag frá kl. 16 til 20 uttan leygardag og sunnudag, tá hon hevur verið frá kl. 14—20.

Tað var eitt ynski frá sjúklingunum at fáa ta gomlu vitjanartíðina broytta, soleiðis at fólk betur kundu leggja sínar vitjanir til rættis.

Verða ov leingi á sjúkrahúsinum

— Tíverri hava fólk ikki verið so lagalig, sum vit høvdu vónað, sigur fyristøðukvinnan á Landssjúkrahúsinum, Hjørdis Hansen, í samrøðu við Sosialin.

Hon sigur, at tann langa vitjanartíðin hevur ikki verið so heppin fyri fleiri av sjúklingunum. Tað hevur nevniliga víst seg, at nógv av teimum vitjandi verða verandi á sjúkrahúsinum alla vitjanartíðina frá kl. 16 til 20. Hetta hevur serstakliga nervað teir meira ússaligu sjúklingarnar. Hetta var ikki ætlanin við nýggju vitjanartíðini.

Sjúklingarnir ónøgdir

Men hvat siga tá sjúklingarnir sjálvir! Fyri at kanna teirra áskoðan um vitjanartíðina hevur Landssjúkrahúsið givið sjúklingunum spurnarbløð.

Úrslitið av hesi kanning vísur, at nærum allir sjúklingar eru ónøgdir við ta longu vitjanartíðina og vilja hava hana broytta.

Niðurstøðan er tann, at tann besta vitjanartíðin hevði verið ein tíma fyrrapart og ein tíma seinnapart.

Starvsfólkið somu áskoðan

Blaðið hjá sjúkrasystrunum — VØKA, hevur gjørt eina líknandi kanning millum starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum.

Eisini henda kanningin kemur til ta niðurstøðu, at vitjanartíðin má broytast til ein tíma fyrrapart og ein tíma seinnapart.

Hjørdis Hansen vísur annars á, at tann langi kavaveturin við áhaldandi krimi hevur ført við sær, at øll seingjarpláss hava verið upptikin umframt at sengur hava staðið á gongunum. Við hesum mongu sjúklingunum hevur ikki verið lætt at hava langa vitjanartíð.

Framlongd til miðjan apríl

— Nú er so ætlanin at finna eina verandi loysn á vitjanartíðini. Royndarvitjanartíðin verður framlongd til miðjan apríl, men tá fáa vit helst eina fasta vitjanartíð, sum serstakliga sjúklingarnir kunnu vera nøgdir við, sigur Hjørdis Hansen. Og eftir øllum at døma verður framtíðar vitjanartíðin á Landssjúkrahúsinum ein tíma fyrrapart og ein tíma seinnapart. Tað skal tó viðmerkjast, at nakrar deildir eru undantiknar. Barnadeildin, intensiva deild og tær sálarfrøðisligu deildirnar hava ikki ásettar vitjanartíðir.



Royndarvitjanartíðin framlongd til miðjan apríl



Sjónleikavikuskifti

Hetta vikuskiftið verður eitt satt sjónleikavikuskifti. Í Suðuroynni eru Havnar Sjónleikarfelag og Losjan í Gøtu við hvør sínum leiki. Havnarfólk spæla Seymistovuna í Vági og gøtufólk Charles tantu á Tvøroyri. Og kvívíkingar halda fram við Troytta Tollaki í heimbygdini. Ein fyrstaframførsla verður eisini. Tað eru næmingar úr øðrum real í Kommunuskúlanum í Havn, sum við hjálp frá Linu Larsen hava sett upp leikin Jákup á Mon eftir Sigrid Niclasen. Tey hava vant síðani á jólum og í kvøld kl. 7 leggja tey í vaðið — væntandi fyri fullum Sjónleikarhúsi.

Hetta er fyrstu ferð í góð 60 ár, at Jákup á Mon verður framførdur í Havn.

DANIR OG KLAKSVÍKINGAR SKITTLIGARI?

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Ríkishospitalinum verður ein ikki koyrdur í bað (sjálvandi er ein vaskaður, áðrenn ein fer heiman), men verður vístur til stovu, song, skáp o.s.fr., tá ein verður innlagdur.

Á Landssjúkrahúsinum skalt tú í bað og verður lagdur í song, eisini um tú verður fluttur av Klaksvíkar sjúkrahúsi til Landssjúkrahúsið.

Eru danir og klaksvíkingar skittligari enn tey á Landssjúkrahúsinum?


Reinur

Hjørdis Hansen svarar eisini hesum spurninginum. Hon sigur, at tað er ikki venja á Landssjúkrahúsinum at koyra fólk í bað, tá tey skula leggjast inn. Tað neyvan meira enn hendir seg, men í einstøkum førum verður fólk boðið at fara í bað, tey verða ongantíð tvingað til tess.

Orsøkin til, at sjúklingar verða koyrdir í song, er tann, at teir skula kannast beinanvegin.

Eftir kanningina kann sjúklingurin sjálvandi fara aftur á føtur.

Tit ringja — vit skriva



Ringið telefon
11820
ella **14720**

TELEFON VIÐ SONGINA

Songarliggjandi sjúklingar á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Ríkishospitalinum kunna fáa telefon inn til songina og verða uppringdir av familjuni ella sjálvir ringja til familjuna.


Hetta letur seg ikki gera á Landssjúkrahúsinum. Hvussu ber tað til?

Tlf.

Hjørdis Hansen, fyristøðukvinna sigur, at Landssjúkrahúsið hevur ov fáar telefonlinjur til, at sjúklingar kunnu fáa telefon inn til songina. Men ein telefonboks er á hvørjari gong.

trý á gøtuni

Búskaparráðið og bankarnir mæla til, at privata nýtslan má minkast. Hvussu eigur hetta at verða gjørt?



Edvard í Skorðuni Joensen, skrivstovumaður:
— Við t.d. at byggja smærri hús og keypa færri bilar.



Ingolf Paturson, næmingur:
— Fyrst og fremst við at keypa færri bilar — og minni. Og so leggja sigarettirnar á hillina, og sjónvarp, tað er ikki neyðugt!



Arne Thorsteinsson, savnsvørður:
— Tað, sum fyrst fellur einum í hug, er bilarnir, teir eru ein orsøk til ein stóran part av uttanlandaskuld okkara. Men tað at byggja hús, tað er ein eingangs-fyritøka, men uttanlandaferðirnar, tær eru dýrar.